# Spæligleðin skal dríva verkið

**Musikkskúlin í Suðuroy gongur nýggjar leiðir fyri at fáa meiri burturúr pengunum og tað stendur ikki á at fáa næmingar**

MUSIKKSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Børn vita oftani ikki, hvat tey hava hug til. Tí eiga vit at beina tey á røttu kós.

Hetta er ein sannroynd, sum musikkskúlin í Suðuroy hevur tikið til sín.

Musikkskúlin í Suðuroy gongur nú nýggjar leiðir.

Endamálið er fyrst og fremst at fáa børn at taka ljóðføri í hond. Men endamálið er eisini at fáa meiri burturúr tí avmarkaða penningi, sum verður tillutaður musikkskúlanum.

Men tað er altíð spæligleðin og hugurin, sum skal dríva verkið, sigur Ulf Nordlund, studentaskúlalærari, musikkskúlalærari og leiðari fyri musikkskúlan í Suðuroy.



*Hesir báðir halda taktini á trummunum*

### Leita eftir næmingum

Hann hevur sera drúgvar royndir í at arbeiða við børnum og hann sigur, at ofta er tað trupult at fáa næmingar til musikkskúlan.

– Tað vanliga er, at musikkskúlin letur næmingarnar koma til sín. Tað er ikki vanligt, at musikkskúlin ger eitt uppsøkjandi arbeiði fyri at fáa næmingar.

Men tað ger musikkskúlin í Suðuroy.

Farið verður út á skúlarnar at royna tónlistarligu evnini hjá næmingunum. Við sær hava lærararnir eina serliga tónleikaroynd.

– Tað ræður um at finna teir næmingar, sum hava evnini at spæla og at eggja teimum at ganga í musikkskúla. Vit skulu finna teir evnaríku næmingarnar og geva teimum møguleikan at royna seg, sigur Ulf Nordlund.

– Á henda hátt fáa vit eggja næmingarnar at melda seg í skúlan. Vit fortelja næmingunum, at vit halda, at teir hava góð evni at spæla eitt ávíst ljóðføri og at vit halda, at teir áttu at melda seg til skúlan.

– Hetta er eitt tilboð til næmingarnar, sum teir allarflestu taka av.

Tað stendur heldur ikki á at fáa næmingar til musikkskúlan.

### Undirvísa í bólkum

Men í Suðuroy brúka teir ikki einstaklingaundirvísing, har ein lærari venur við einstøkum næmingum.

– Vit halda, at vit fáa ikki nóg nógv fyri peningin á tann hátt. Tí hava vit heldur gjørt størri orkestur, har vit fáa undirvíst fleiri næmingum ísenn. Einasti máti at fáa sum mest burturúr pengunum, er at undirvísa í bólkum.

Hann heldur, at tað er neyðugt at ganga aðrar leiðir við musikkskúlanum úti um landið, har bygdirnar eru spjaddar, enn tað tey ganga í Havnini og í Klaksvík, har alt er samlað.

– Men tað skal gerast á ein hátt sum ger, at næmingarnir tíma at halda á.

Hann dylir kortini ikki fyri, at tá ið næmingarnir verða heilt dugnaligir at at spæla uppá, so verður tað neyðugt við einstaklingaundirvísing.

– Men tað er yvirhøvur ikki tað, vit tosa um á hesum støðinum. Vit skulu hava tað stuttligt og tann sosiala samveran hevur stóran týdning í undirvísingini.

– Men tað skal heldur ikki takast frá næmingunum, at nógvir teimum eru rættiliga evnaríkir. Teir skulu bara haldast til.

Yvirhøvur heldur musikkskúlalærarin, at tað eru nógv fleiri børn við tónlistarligum evnum í Føroyum, enn tað er vanligt í Danmark, Svøríki hinum norðurlondum.

– Í Føroyum eru nakrir serligir møguleikar at menna tónleikarar, sum eg ikki havi sæð aðrastaðni.

Hann veit ikki, hví so er, men hann ein orsøk kann vera, at føroyingar eru vanir at syngja allarstaðni, har teir eru.

Lærarin leggur afturat, at musikkskúlin hevur eisini fingið samstarv í lag við Vágs skúla, soleiðis at næmingar við atferðartrupulleikum av ymsum slagi sleppa í musikkskúlan at spæla.

Hann sigur, at royndirnar av hesum eru sera góðar, bæði tí næmingarnir hava evni at spæla og tí at skúlin leggur til merkis, at tað eisini mennir næmingin á annan hátt.

Hann sigur, at hesin áhugin hjá børnunum í Suðuroy at spæla í musikkskúlanum, speglast aftur í samfelagnum annars. Eitt nú vísur tað seg nú at vera nógv lættari hjá skúlanum at fáa fyritøkur at stuðla skúlanum peningaliga, eitt nú hevur skúlin fingið munagóðan stuðul frá sparikassunum báðum, Suðuroyar og Føroya.

### Konsertir hetta vikuskiftið

Fyribils úrslitið av royndunum í Suðuroy verður at hoyra hetta vikuskiftið, tá ið orkesturvikuskifti verður í skúlanum í Trongisvági.

Hetta vikuskiftið fara musikkskúlanæmingarnir at vísa síni kynstur fyri suðuroyingum í einum stórum harmoniorkestri og einum hornorkestri.

Umframt næmingarnar, verða eisini Tvøroyrar Hornorkestur, GHM, Klarinetorkestrið og Tórshavnar Ungdóms Harmoniorkestur við.

Í tí sambandinum verður konsert í skúlanum í Trongisvági seinnapartin sunnudagin klokkan 15.



*Næmingarnir eru sera hugagóðir. Musikkskúlalærarin er vísur á, at gjørdi musikkskúlin í Suðuroy ikki eitt uppsøkjandi arbeiði, hevði ikki ein tann einasti av hesum næmingunum verið í musikkskúlanum*



*Í musikkskúlanum í Suðuroy undirvísa tey í bólkum fyri at fáa meiri fyri pengarnar. Fyribils úrslitið verður at hoyra á konsert í skúlanum í Trongisvági hetta vikuskiftið*



# Vágstún skal snøggast

**Um stutta tíð verður arbeiðið at fríðka um Vágstún í Klaksvík boðið út. Gamli kirkjugarður verður meiri opin og bæði fríøki og parkeringsøki verða gjørd á økinum niðan fyri minnisvarðan fyri teimum sjólætnu**

FRÍÐKAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Síðani rundkoyringin við posthúshornið var liðug fyri umleið einum ári síðani, hevur økið rundan um verið nýtt sum best ber til. Ferðslan oman og niðan við gamla kirkjugarði norðarumegin, hevur verið nakað ivasom, tí uppmerkingin ikki hevur verið nøktandi.

Samstundis sum økið heldur ikki hevur verið nakað serliga vakurt á at síggja. Men tað verður broytt nú.

Býráðið hevur samtykt ætlanina um at fríðka økið við Vágstún. Tekningin frá Fuglø Arkitektum vísir, hvussu økið við gamla kirkjugarð kemur at síggja út – helst komandi summar.



*Soleiðis kemur Vágstún at síggja út sambært modellmynd frá Fuglø Arkitektum*

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri sigur, at arbeiðið verður boðið út sum skjótast, og er ætlanin at nakað skal gerast í ár og so restin komandi ár.

– Hetta er eitt arbeiði, sum má gerast í stigum, tí vit mugu sýna ferðsluni atlit, greiðir hann frá.

### Lætt atkomuligt

Sambært tekningini verður sjálvur garðurin rundan um minnisvarðan fyri teimum sjólætnu tikin niður. Ein nýggur garður verður so laðaður, men hann verður munandi lægri enn tann í dag. Síðani verður plantað rundan um, so at minnisvarðin kortini verður vælvardur.

– Vit meta, at vit kunnu varðveita friðin rundan um minnisvarðan best á henda hátt, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Síðani rundkoyringin kom, hevur eitt fríøki verið niðan fyri kirkjugarðin. Fólk hava kanska verið nakað í iva um, hvat tað skal nýtast til, men sambært hesi ætlanini at fríðka Vágstún, verður norðari parturin av økinum nýtt til fríøki, har benkur og annað kemur at standa. Sunnari parturin verður so nýttur til parkeringspláss, men tað verður ógvuliga avmarkað, hvussu nógvir bilar kunnu standa har.

Hendan ætlanin letur upp fyri minnisvarðanum, og tað verður munandi lættari at koma til hann í framtíðini. Hóast tað ber borgarstjórin ikki ótta fyri, at herverk ella nakað annað fer at vinda upp á seg.

— Hatta er eitt so mikið vakurt stað, at eg trúgvi, at tað fer at fáa frið, sigur borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen.

# Astri Luihn í Leikalund

**Fríggjadagin 5. november klokkan 16 letur upp ein nýggj framsýning í Leikalund við 16 listaverkum eftir Astrid Luihn. Harafturat verða eisini fleiri tekningar eftir listakvinnuna við framsýningini**

TÍÐINDASKRIV
*Leikalund*

Innan føroysku listina eru myndirnar hjá Astri Luihn sermerktar.

Hon arbeiðir við grafikki og málningalist, og flestu verk hennara eru soleiðis samansett av hesum báðum tøkum.

Gjøgnumgangandi á myndunum síggja vit fuglar. Bjargafuglar, kvæðafuglar, ævintýrafuglar og allir siga teir sína søgu.



*Astri Luihn hevur listaframsýning í Leikalund í Klaksvík í november mánaði. Fernisering verður fríggjadagin klokkan 16*

Verkini, ið verða sýnd fram í Leikalund, eru gjørd á linoleum. Partar av myndini eru skornir út, partar eru prentaðir og partar eru málaðir.

Við hesum blandaða tøkni gandar Astri Luihn fram sterkar og hugtakandi myndir.

Astri Luihn er fødd í 1949 og er útbúgvin MA við lærda háskúlan í Oslo. Hon hevur í mong ár arbeitt burturav við list, og hon hevur sýnt fram víða hvar. Nevnast kunnu lond sum: Týskland, Írland, Danmark, USA, Áland, Svøríki og so sjálvandi í Føroyum.

Somuleiðis eru verk eftir Astri umboða á fleiri almennum støðum. Eitt nú kunnu hennara myndir síggjast í Listaskálanum, Listasavnið Reykjavikar, Nordatlantisk Brygge í Keypmannahavn, Den Danske Bank og Føroya Sparikassa.

Framsýningin við Astri Luihn er at síggja í Leikalund allan november mánað.

Til ferniseringina klokkan 16 fríggjadagin, spælir Kjell Orseth nøkur løg, og Edward Fuglø bjóðar vælkomin. Framsýnginin, ið tekur við eftir Astri Luihn, er við Kára Svensson, sum sýnir fram í desember.

## H.C. Andersen-dagur í Klaksvík

Í sambandi við, norðurlendsku bókasavnsvikuna, skipar Klaksvíkar bókasavn fyri einum H.C. Andersen-degi mánadagin 8. november.

Hendan dagin verður upplestur av ævintýrum hjá H. C. Andersen kl. 16.00 og kl. 17.00.

Klokkan 19.00 verður hugnaløta fyri vaksin og foreldur/ børn. Tá verður ævintýrið "Mishátti dunnuungin" lisið fyri børnunum. Aftaná fara børnini at tekna okkurt av ævintýrunum hjá H.C. Andersen, sum tey kenna. Meðan børnini tekna og hugna sær verður ævintýrið "Tað ótrúligasta" lisið fyri teimum vaksnu og sagt verður frá um H.C. Andersen og lív hansara. Síðani verður kaffi, saft og køkur at fáa.

Á øllum teimum norðurlendsku bókasøvnum, sum taka lut í felags bókasavnsvikuni verður skipað fyri einum tílíkum upplestrarkvøldi sama kvøld.

Tað eru átta ár síðani at byrjað varð at hava eitt felags upplestrarkvøld í øllum Norðurlondum, og er hetta fimtu ferð, at Klaksvíkar bókasavn er við. Ymiskt er, hvat hevur verið lisið hesi árini. Í ár hevur norðurlendski fyriskipanarbólkurin valt at lesa ævintýr hjá H.C. Andersen við tað, at tað komandi ár eru 200 ár síðani, hann var føddur.

## Gallaveitslan hjá KÍ klár

Fyrireikingarnar til 100 ára veitsluna hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag eru so at siga komnar undir land. Veitslan verður í KÍ høllini leygarkvøldið 13. november klokkan 19.30. Mangt og hvat verður á skránni. Jákup Ziskason stendur fyri matgerðini og borðreiðir hann við trírættaðari matskrá. Undir borðhaldinum fara millum annað Pipar og Salt at undirhalda.

Eisini fara allir FM vinnararnir hjá KÍ júst farna kappingárið á pallin, KÍ-cheerleaders fara at framføra, ársins KÍ arar verða kosnir, heiðurslimir verða kosnir og gestarøðarar vera eisini at hoyra. Til dansin aftaná spæla Fróði og Deiggj.

Atongumerki til veitsluna kunnu keypast á Statoilstøðunum í Klaksvík og Gundadali og í Kiosk Vár í Klaksvík.

Fyrireikararnir siga, at enn er ikki so langt síðani, at atgongumerkini vórðu løgd út til sølu, so enn er ikki greitt, hvussu undirtøkan higartil er.

**- sae -**